# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Óli Fuglø, Norðdepli,** ættaður av Viðareiði, andaðist leygar-morgunin í heiminum, 77 ára gamal.

**Elin Sofia Lauritsen úr Sørvági**, andaðist sunnudagin í heiminum hjá dótturini, 85 ára gomul.

Kistan við **Gunnar Poulsen**, vanliga nevndur **Gunnar í Myllugarði**, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Sumbiar kirkju mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Gunnar, kunnu lata Sumbiar kirkju eina gávu.

**Petur Christian Jacobsen, Leirvík,** andaðist mánamorgunin á Landssjúkrahúsinum, 83 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Petur Christian kunnu lata heiminum á Mýrunum í Runavík eina peningagávu, konta í Eik.

**Jónhild Petersen, fødd Dam, Sandavági,** andaðist leygardagin, 57 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 14 í Sandavágs kirkju. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jónhild, kunnu lata Føroya felag móti Krabbanmeini eina gávu, konto í peningastovunum.

Til minnis um abba okkara

# Hartvig Poulsen í Vági

f. 23. mars 1932 d. 7. august 2009



*Hartvig abbin farin ert tú,*
*og eftir við sorgini sita vit nú.*
*Men minnini aldrin burtur fara,*
*um tína sál so góða og kæra.*

*Tú hevur okkum við søgum fylt,*
*ta løtuna var alt so stilt.*
*Ja hesa løtu tú segði frá,*
*man alla søguna fyri sær sá.*

*Góði abbi tú elskaður var,*
*ikki minst av okkum, sum vóru tær nær.*
*Tú kundi so mangt við hondunum byggja,*
*bæði hús og bátar eftir teg lyggja.*

*Nú hevur Guð tínar dagar talt,*
*og vit vilja takka tær fyri alt.*
*Betri abba vit ei kundu ynskt,*
*nú manglar bert tað, sum er allar tyngst.*

*At siga farvæl er ikki lætt,*
*tað er sikkurt og púra satt.*
*Nú følist alt so tómt og kalt,*
*men góði abbi takk fyri alt.*

Hvíl í friði

**Abbasynirnir**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Petur Chr. Jacobsen**
Leirvík

andaðist mánamorgunum á Landssjúkrahúsinum
31. august, 83 ára gamal.

Bønarhald verður á Landsjúkrahúskapellinum
mikudagin kl 17.
Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju hósdagin kl 13.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bodil, Jógvan Jákup, Richard, Maria, Súsanna og Árni**

Tey, ið ynskja at minnast Petur Chr. kunnu lata eina peningargávu til »Heimið á Mýrunum« í Runavík, konta í Eik

# Rundir starvsdagar hjá Auto Service




*Starvsfólk sum kunnu halda rundar starvsdagar hjá Auto Service, f.v.: Páll Danielsen, Erhard Olsen, Erling Olsson og Ingibjartur Durhuus*

*Mynd: Heðin Weihe*

Hósdagin var lítið hátíðarhald hjá Auto Service í Havn í sambandi við at Erhard Olsen hevur arbeitt í fyritøkuni í 35 ár.

Trý onnur starvsfólk í fyritøkuni kunnu eisini hátíðarhalda rundar starvsdagar í hesum døgum, tey eru Ingibjartur Durhuus, Erling Olsson og Páll Danielsen.

Fyri at taka Erhard Olsen fyrst so fór hann í læru sum bilmekanikari hjá Auto Service í Gundadali í 1974. Hann hevur øll árini arbeitt á mekaniska verkstaðnum, har hann javnan hevur dagført sína vitan og verið á nógvum ymiskum skeiðum í nýggjastu tøknini. Hann kundi sostatt hátíðarhalda sín 35 ára starvsdag í fyritøkuni.

Ingibjartur Durhuus hevur arbeitt í fyritøkuni í 45 ár. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Wenzel Petersen úti í Bakka, áðrenn hann kom í starv hjá Auto Service í Gundadali í 1964. Hann var í mong ár verkførari á bilverkstaðnum, og seinnu árini hevur hann havt mest við garanti av nýggjum bilum at gera.

Erling Olsson hevur arbeitt í fyritøkuni 30 ár. Hann byrjaði hjá Auto Service í 1979. Tá var fyritøkan flutt í nýggjan virkisbygning á Hálsi. Hann hevur arbeitt mest sum plátusmiður og lakkerari, og var hann í mong ár verkførari á tí deildini. Í dag starvast hann sum húsavørður og á mekaniska verkstaðnum.

Eisini Páll Danielsen hevur arbeitt í fyritøkuni í mong ár. Komandi ár kann hann halda sín 30 ára starvsdag. Páll byrjaði hjá Auto Service á Hálsi, og hevur hann selt bilar øll árini. Fyrstu árini vóru tað einans Nissan og Peugeot bilar teir seldu. Í dag selur Auto Service eisini bilmerkini Opel, Saab og Chevrolet. *mg*

## Dagurin

1. september. Aigidius, deyður ár 720. Hann var ættaður úr Athen og kom sum pílagrímur til Arles í Fraklandi, har hann í einum skógi nærhendis fekk sær einbýli í einari holu. Fólk høvdu við orði, so guðrøkin hann var, og kongur gav honum loyvi til at byggja eitt kleystur. Sjálvur var hann fyrsti abbatin, og eftir deyða hansara vitjaðu pílagrímar næstan líka so nógv í Arles sum í Róm ella Santiago de Compostela.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*